# Hjálpið jødunum heim!



Nýggjur føroyskur felagsskapur, **"HJÁLP JØDUNUM HEIM"** varð stovnaður í 2007. Felagsskapurin samstarvar við viðurkenda ísraelska felagsskapin **KEREN HAYESOD,** sum varð stovnaður í London í 1920, og hvørs aðalendamál er at savna inn pening til at hjálpa jødunum heim til egna land sítt, Ísrael. Les meira á: www.kh-uia.org.il

## Nevnd

Aðalfundirnir í feløgunum **"Vinir Ísraels í Føroyum"**, **"Ísraelsfelagið"** og **"Ísraelsmissiónin"** velja nevndina í nýggja felagsskapinum "HJÁLP JØDUNUM HEIM".



**Sangkvinnan Israela Assago, sum kom við mammu síni til Ísraels fyri 24 árum síðan.**

## Endamál

Seinastu 1900 árini hava nærum allir jødar verið spjaddir kring heimin.
Tá Ísrael varð endurstovnað 14. mai 1948, byrjaðu jødarnir av álvara at flyta aftur til land sítt, men enn eru nógvir eftir.
Í fleiri londum hava jødar tað ikki gott. Nógvir eru fátækir, og í fleiri londum verða teir atsøktir, og aðrastaðni er bæði hungur og kríggj.
Tað ræður um at hjálpa so mongum sum tilber at flyta heim til Ísraels, har tikið verður sera væl ímóti teimum. Tá hálvt ár, ella eitt ár er farið, hava nýggju innflytararnir í flestu førum lært seg málið, fingið arbeiði og egnan bústað.
Børnini hava tað stak gott í Ísrael.

## Hvussu ber til at stuðla?

Tú kanst hjálpa jødunum heim við peningagávu, størri ella minni. Tú kanst stuðla eina ferð, og tú kanst stuðla regluliga við fastari flyting. Øll, sum stuðla, fáa bræv frá okkum. Um tú ynskir at stuðla, so ber til at fylla út hendan seðilin, og senda hann til okkara:
**HJÁLP JØDUNUM HEIM, Postsmoga 1199, FO-110 Tórshavn.**
Eisini ber til at senda seðilin beinleiðis til peningastovn tygara.

Tað ber til at seta seg í samband við felagsskapin:
**HJÁLP JØDUNUM HEIM**
Postboks 1199
FO-110 Tórshavn
tel.: (+298) 21 26 00




DIMMALÆTTING TLF. 541200

## Lyfti um signing

*Harrin segði við Ábram: "Eg skal gera teg til stórt fólk; Eg skal signa teg og gera navn títt stórt, og tú skalt vera til signing. Eg skal signa tey, ið signa teg ... og í tær skulu allar ættir á jørðini verða signaðar."*
***(Brot úr 1. Mós. 12)***

* Vinalag millum føroysku og ísraelsku tjóðirnar *

Til peningastovnin:
Fbk. / Eik / Suð.Spk. / Norð.Spk. / Postgiro

Ger so væl at flyta av mínari konto:

nr.: ________-______________________ (tygara konto nr.)

kr. ______________

til felagsskapin "HJÁLP JØDUNUM HEIM"
Flytingin ynskist:

☐ Eina ferð
☐ [illegible]
(Set kross) [illegible]

Dato: Undirskrift:

### Hjálp jødunum heim hevur konto:

| | |
|---|---|
| Føroya Banki: | 6460 173 561 6 |
| Eik: | 9181 153 329 2 |
| Suðuroyar Spk.: | 9870 102 507 5 |
| Norðoya Spk.: | 9865 103 598 8 |
| Postgiro: | 9909 020 680 6 |

Together we make things happen

SAMSKIP



> STARV INNAN SHIPPING OG SKRIVSTOVU

Samskip søkir eftir dugnaligum og ágrýtnum fólki til skrivstovu okkara í Havn.

**Vit bjóða** eitt starv í shipping og skrivstovuarbeiði í útflutningi. Í arbeiðinum samskiftir tú við viðskiftafólk og systurfyritøkur í Føroyum og úti í heimi. Tú kemur at starvast í einum lokalum og altjóða kappingarumhvørvi saman við einum ungum og dynamiskum toymi.

**Vit vænta** at tú hevur viðkomandi útbúgving og royndir. At umsøkjarin er nærlægdur, miðvísur og dugir at arbeiða í einum umhvørvi, har úrslit, tænasta og deadline eru lyklaorð. Vit vænta at tú dugir væl at samskifta á enskum.

**Løn** sambært avtalu, treytað av útbúgving og royndum.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Joel undir Leitinum, stjóra á telefon 30 88 11.

**Umsókn við CV** skal sendast til: Samskip, Box 3255, FO-110 Tórshavn. Brævbjálvin skal merkjast "umsókn". Umsóknarfreistin er 20. mars. Starvið verður sett skjótast tilber.

Samskip í Føroyum bjóðar viðskiftafólki sínum flutnings- og goymsluloysnir við tilhoyrandi tænastum, bæði í Føroyum og úti í heimi. Samskip er partur av Samskip HF. Hjá Samskipum starvast 1.400 fólk á 59 skrivstovum í 23 londum. Samskip hevur tvey skip sigland í FAS. Tvær linjur sigla uppá Føroyar. Til og úr Føroyum verður sigt til Immingham, Rotterdam, Cuxhaven, Varberg, Aarhus, Reykjavík og Reyðarfjørðin.